# Finleif Mortensen í Smiðjuni



*Fríggjardagin 27. oktober letur Finleif Mortensen upp eina málningaframsýning í Smiðjuni í Lítluvík*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Fríggjardagin 27. oktober 2006 kl. 15.00 letur ein málningaframsýning upp í Smiðjuni í Lítluvík. Tað er Finleif Mortensen á Agjum, sum sýnir fram.

Bygdin og tey figurativu húsini í tí skiftandi ljósinum geva listamanninum íblástur,

Hóast tað ofta eru tey somu plássini ella tær somu bygdirnar, ið ganga aftur sum myndaevni, so gevur tað skiftandi ljósið og skuggaspælið millum húsini eina skiftandi mynd, har húsini og fjøllini gerast eins og litríkir skulpturar, sum skifta skap í takt við tað skiftandi ljósið.

Hetta er ikki fyrstu ferð at Finleif sýnir fram í Smiðjuni, fyrstu ferð var í 1985 og hevur hann havt fleiri framsýningar síðani tá. Hann hevur eisini luttikið á ólavsøkuframsýningum og várframsýningini.

Við á framsýningini eru 20 málningar, sum eru málaðir tað seinasta árið.

Framsýningin er opin til týsdagin 31. okt. 2006 . Opið er hvønn dag frá kl. 14 - 20, tó leygardagin frá 10 – 13.

†

## Andlát og jarðarferðir

**Jon Haraldsen** fer til gravar úr Vestmanna kirkju hósdagin kl. 14. Sungið verður úr sálmabókini. Tey ið vilja minnast Jon, kunnu lata eina peningagávu til Føroya Blindafelag, konta í Føroya Sparikassa.

**Dagurin í morgin**

**27. oktober. Sem**. Hann var elsti sonur Nóa og var ættfaðir at semitisku fólkasløgunum. Navnið er hebráiskt og merkir sonur ella arvingi.

Sosialurin
www.sosialurin.fo

# Ársins stóra árasøla í Frelsunarherinum




Hóskvøldið 26. oktober kl. 19 byrjar stóra árasølan (basarur) í Frelsunarherinum í Havn.

Sámal Jákup Joensen, leiðari hjá Frelsunarherinum, sigur, at árasølan er figgjarligi krumtappurin í virkseminum hjá Frelsunarherinum.

Tað er heimaforbundið, sum skipar fyri árasøluni einaferð um árið.

Nógvir góðir vinningar eru komnir inn – yvir 200 í tali, har eru m.a. krov, turt kjøt, turrur fiskur og nógv ymisk bundin klæði.

Árasølan byrjar kl. 19 og heldur á til umleið kl. 22. Um hálvgum nýggju tíðina verður ein støðgur við drekkamnunni. Øll eru vælkomin, sigur Sámal Jákup Joensen.